NSÍ-B36 0-0:

# Sluppu undan tapi

**NSÍ og B36 býttu stigini ímillum sín sunnudagin, og hóast báðir partar heldur vildu havt trý, so mundi javnleikurin tó kortini vera á eini leið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og flestu aðra staðni í landinum var spenningurin eisini stórur í Runavík, tá lagt varð til brots í fótbóltslandskappingini. Spenningurin í Runavík stavar ikki minst frá, at lið teirra nú tykist hava tveitt tilveruna sum elevatorlið burtur, og tosið um heiðursmerkið er so smátt vorðið alsamt heitari seinastu árini.

Tað hevur tað eisini gjørt í Havn, har B36 ætlar at betra heilt nógv um úrtøkuna í fjør. Liðið er styrkt við fleiri væl kendum føroyskum fótbóltsnøvnum, og í leygardagsblaði okkara varð NSÍ liðskiparin, Djóni N. Joensen, endurgivin fyri at siga, at uppgávan kundi valla verið størri nú í fyrsta landskappingardystinum.



*Úr Runavík verður sagt, at leikferðin á dystinum var sera høg, tá hugsað verður um, at hetta var fyrsti landskappingardysturin á árinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Skiftust um yvirvágna

Fyrra hálvleik var eisini okkurt, sum bendi á, at uppgávan fór at gerast tung hjá heimaliðnum. Uttan at talan á nakran hátt var um at gestirnir domineraðu dystin, so høvdu teir kortini betra takið, skilst úr Runavík, har tað annars verður sagt, at leikferðin undir dystinum var óvanliga høg, tá havt verður í huga, at hetta var fyrsti veruligi dysturin.

B36 megnaði tó ikki at umseta leikligu yvirvágina til nakrar stórar málmøguleikar. Okkurt hissini langskot mundi vera tað vandamesta, men veruligar møguleikar varð talan ikki um.

Í so máta lág betri fyri í seinna hálvleiki, tá heimaliðið kom alt betri við í dystin. Í mun til gestirnar dugdi NSÍ eisini at umseta spælið til møguleikar, og í einum tveimum førum var tað bert svartasta óhapp, at bólturin ikki fór í málið. Millum annað hevði Tróndur Vatnhamar eina framúr góða bjarging, meðan Pól Thorsteinsson eina aðru ferðina bjargaði á málstrikuni.

## Ivamál um hendurnar

Størsta trætumálið undir dystinum mundi tó íkoma, tá B36 fekk sín størsta møguleika í dystinum. John Petersen varð leiktur leysur innan fyri verjuna hjá NSÍ, og helt avstað oman móti málinum. Jens Martin Knudsen fekk tó vart fyri, men tað vóru fleiri, sum hildu, at landsliðsmálverjin var staddur uttan fyri brotsteigin, tá hann kavaði niður, og tók bóltin frá John. Dómarin læt tó ikki við seg koma, men bað ístaðin leikararnar um at spæla víðari.

Talan kundi lættliga verið um eitt sigursmál hjá havnarliðnum, um John Petersen slapp fram við Jens Martini, og ivaleyst iðra tey í árstalsfelagnum seg um hetta. Hinvegin er helst einki at taka seg aftur í, at javnleikur mundi vera á eini leið. Bæði liðini sýndu til tíðir, at tey kunnu spæla góðan fótbólt, eins og leikararnir tykjast at vera sera væl fyri kropsliga. Sostatt vóru fleiri tekin um, at bæði liðini kunnu gera seg galdandi í ár, og í so máta var týdningarmesta fortreytin undan dystinum, at hann ikki skuldi tapast.

**NSÍ-B36 0-0**
Dómari: Niklas á Liðarenda
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Jónstein Petersen – Dánjal Hansen, Elian Hansen, Ian Højgaard – Gert Langgaard, Sjúrður Jacobsen, Christian Høgni Jacobsen
B36: Tróndur Vatnhamar – Pól Thorsteinsson, Arnbjørn Danielsen, Herbert í Lon Jacobsen – Klæmint Matras, Jan Guttesen, John Petersen, Jens Kristian Hansen, Heðin á Lakjuni – Jákup á Borg, Egil Zachariasen.

B71–EB/Streymur 1–0 (0–0):

# Sandoyingar lættir um hjarta

**Uppflytararnir úr EB/Streymi halda, at teir stóðu royndina, men teir iðra seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at javna í síðstu løtu**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Hóast talan var um fyrsta leikumfarið, og øll liðini harvið stóðu á støðutalvuni við ongum stigi, so kendist tað á Sandi, sum um talan var um botnstríð. Bæði heimaliðið og gestirnir úr EB/Streymi vóru meiri upptiknir av ikki at tapa, enn at leggja dent á at vinna.

At so stórur týdningur varð lagdur í ikki at tapa, hevði við sær, at tað var ikki sært nervakent, og tað sást aftur á spælinum. Uppløgdu málmøguleikarnir kundu teljast á aðrari hondini, og í 1. hálvleiki var eingin upplagdur møguleiki.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki skoraði Jógvan Jón Petersen einasta málið. Tað kann eina ferð í heyst fara at vísa seg, at hetta málið – um enn ikki gull vert – so fer at hava alstóran týdning, tá kappingarárið verður talt saman og støðan gjørd upp. Málið kom eftir frísparksinnlegg úr høgru. Jógvan Jón rann fram um verjumannin og við ytru síðuni av fótinum lyfti hann bóltin inn um Gunnar á Steig, sum tvær ferðir um vikuna ferðast úr Klaksvík og norður til Eiðis at venja.

EB/Streymur royndi at leggja stórt trýst á síðstu løtuna, og tað var um reppið, at teir javnaðu. Jákup Martin Joensen, sum hevði týdningarmiklan leiklut á miðvøllinum, sendi eftir horna dygst skeivu megin stólpan, og Sorin Anghel, sum á miðvøllinum í vinstru arbeiddi nógv og var dugnaligur við bóltinum, hevði eisini eina góða skotroynd.

– Eg eri væl nøgdur við avrikið hjá okkara monnum. Teir sýndu rætta hugburðin. Vit dumpaðu avgjørt ikki, men eg haldi, at tað var spell, at vit ikki javnaðu. Spælararnir høvdu havt uppiborið at javna, heldur Bergur Magnussen, sum er venjari hjá ungu monnunum í EB/Streymi, sum ikki hava royndir av at spæla í bestu deildini.

Bergur Magnussen og Kári Reynheim hava áður spælt nógv saman, m. a. á oyggjaleikalandsliðnum í 1989. Sunnudagin vóru teir venjarar hjá hvør sínum liði. Kári Reynheim setti seg sjálvan á liði. Hann var inntil eina lítla løtu inn í 2. hálvleik miðframherji hjá B71. Tá vit spurdu venjarin hjá EB/Streymi, um hann ikki hevði hugsað um at seta seg sjálvan á liðið hjá EB/Streymi, svaraði hann soleiðis:

– Mín tíð sum fótbóltsspælari er farin. Vit hava nógvar hugagóðar, raskar og eisini evnaríkar spælarar. Teir hava ikki royndir av at spæla í 1. deild. Tær royndirnar fáa teir við at spæla.

Hvat heldur tú um avrikið hjá Kára?

– Hann hevur altíð verið ein góður spælari. Nú tekur hann sær ivaleyst av venjingini, so umstøðurnar at gera so nógv við venjingina eru neyvan tær somu hjá honum nú, sum tær onkuntíð hava verið. Men tað sást, at hann framvegis megnar at halda upp á bóltin og at sleppa honum í rættari tíð.

## Fleiri broytingar

B71 liðið stóð seg ikki serliga væl í steypakappingini. Tá vóru nógvir spælarar skaddir og sjúkir. Nú eru teir komnir fyri seg, og liðið var øðrvísi sett saman, enn tað hevur verið higartil í ár. Merkisvert var tað, at einasti fremmandi maðurin úti á vøllinum, Julian Floresco, var á beinkinum og ikki kom á vøllin fyrrenn í 2. hálvleiki. Kári Reynheim metti Hans Meinhard Midjord vera betri fyri enn rumenska spælaran.

Bæði liðini vildu hava dómaran, Suna Johansen, at bríksla fyri brotssparki, men tað var dómarin ikki samdur við teimum í.

EB/Streymur, ið hevði Knút Vesturtún sum eyka miðverja ella sera verjukendan sentralan miðvallara, legði bragdliga fyri. Teir tiltuskaðu sær fleiri hornaspørk, men tað spurdist ikki meiri burturúr enn eitt sindur av ruðuleika í B71 brotsteiginum.

Hjá B71 var Eli Hentze hesa ferð á sentrala miðvøllinum saman við Jógvan Jón Petersen, sum annars hevur spælt nógv í miðverjuni. Tað vísti seg at vera klókt. Jógvan Jón skoraði málið, sum fer at hava stóran týdning fyri B71.

**B71-EB/Streymur**
**1-0 (0-0)**
1-0: Jógvan Jón Petersen 70

Dómari: Suni Johansen (SÍF)

B71: Valdemar Nowisci – Bjørn Thorsteinsson, Bernhard Petersen, Bergleif Sólsker – Svenning W. Hansen, Eli Hentze, Jógvan Jón Petersen, Hans Meinhard Midjord – Bárður Bærentsen, Kári Reynheim, Hans Jørgen Djurhuus
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Alfred Jacobsen, Ólavur Poulsen, Christian Carlsson – Halldór Joensen, Knút Vesturtún, Jákup Martin Joensen, Alfred Dahl, Sorin Anghel – Hallur Jacobsen, Jón Sigurd Gleðisheygg



KÍ-GÍ 1-2 (1-1):

# Gøtumenn á høkjum fingu alt í Klaksvík

**Avrikið hjá klaksvíkingum í fyrsta umfarinum gav ábendingar um, at tað fer at vera trupult hjá KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tá Petur Hansen bríkslaði fyri síðstu ferð í Klaksvík sunnudagin vóru gøtumenn uppaftur fegnari, enn teir ofta hava verið eftir sigrar á útivølli. Og tað var væl skiljandi, at teir vóru kátir. GÍ hevur ikki serliga breiðan hóp, og tá tríggir av teimum, sum í kappingini um løgmanssteypið hava verið við til at manna besta liðið, vóru burturi frá, so vóru fyritreytirnar ikki tær bestu. Tað er neyvan langt við síðuna av at staðfesta, at av teimum, sum vóru á vøllinum, mundu einir tríggir havt gott av at spælt á øðrum støði.

At tað hóast vánaligu umstøðurnar eydnaðist GÍ at fara við øllum sigur ikki so lítið um støðuna hjá KÍ. Klaksvíkingar kundu kanska kenna seg eitt sindur snýttar av dómaranum, sum í tveimum førum tók skulu vit kalla tað marginalavgerðir, ið høvdu rættuligan stóran týdning fyri gongdina og harvið úrslitið.

Tað restaði eitt korter av fyrra umfarinum, tá Jan Joensen fekk gula kortið fyri aðru ferð og harvið noyddist av vøllinum. Fyrra kortið fekk hann fyri at halda í Sámali Joensen, og seinna kortið fekk hann fyri eina takling, sum at síggja til ikki var av tí grova slagnum, sum fleiri aðrar, ið ikki vóru sektaðar við gulum kortum.

Og í 2. hálvleiki fekk GÍ eitt brotsspark burtur úr einari støðu, sum ivaleyst hevði verið áhugaverd á seminarium fyri dómarar. Støðan var vandaleys, tá ein gøtumaður royndi at lyfta bóltin út úr KÍ brotsteiginum. Bólturin kom í armin á Tomislav Sivic, sum var staddur dygst innanfyri samankomingina í høgra verjuborði hjá KÍ. Dómarin bríkslaði, og Sámal Joensen var ísakaldur, tá hann sendi Meinhard Joensen í KÍ málinum í annað borðið og bóltin í nettakið í hinum borðinum.

Ásetinginarnar siga, at refleksflytingar skulu sektast, men dómurin er altíð ein metingarspurningur av ítøkiligu støðuni, og tað eru ivaleyst fleiri dómarar, sum ikki høvdu bríkslað í hesum førinum. Men eingin ivi er um, at dómarin kundi verja sína avgerð, og harvið fekk GÍ avgerandi málið, sum seinnapartin av seinna umfarinum hevði við sær, at fyritreytirnar vóru heilt góðar hjá teimum.

## Órudduligt

Klaksvíkingar kunnu harvið kanska halda uppá, at teir vóru eitt sindur óhepnir. Men tað fjalir ikki yvir, at KÍ liðið tykist vera langt frá tí styrki, sum so ofta hevur gjørt, at tey, sum hava vitjað í Klaksvík, hava havt alla orsøk at vera stúrin.

Gøtumenn høvdu so at siga ongan mann í álopinum. Sámal Joensen og Helgi L. Petersen, sum var hangandi miðvallari, arbeiddu sum hestar, í miðverjuni vóru teir tryggir, og tað sær út til, at Poul Henning Jacobsen er um at gerast eitt álit.

Hjá KÍ, sum tíðliga noyddist at skifta Símun Waag Høgnesen út, hekk tað illa saman. Hugflogið var ikki gott í álopsspælinum, sendingarnar fram eftir vøllinum vóru ikki neyvar, og klaksvíkingar gjørdu nógv persónlig mistøk. Tað var eyðsýnt, at í hvussu so er tveir av teimum, sum vóru ímillum teir fyrstu ellivu, ikki vóru í venjingarstøðu, sum tað kann roknast við av monnum á høgsta støði í føroyskum fótbólti.

Merkisvert var tað, at teir á heimaliðnum ikki vunnu ein tann einasta av høgu bóltunum, sum teir royndu at senda í brotsteigin. Nýggi jugoslavin kom á vøllin í 2. hálvleiki, men tað varð ikki staðfest, um hann verður serligur styrkur.

## Fáir møguleikar

Gøtumenn komu á odda, tá eitt korter var farið. Eina lítla løtu býttu Áslakur R. Petersen og Henning Jarnskor um, so hesin seinni fór í høgra verjuborð. Í einasta álopinum hesa løtuna, varð bólturin sendur diagonalt í høgru, og KÍ verjan gav hornaspark. Bólturin slapp at sigla framvið KÍ málinum og aftur um handara stólpan. Bartal Eliasen stútaði, og við nærra stólpan stýrdi Helgi L. Petersen bóltinum inn um strikuna.

Lítla løtu eftir GÍ leiðslumálið, royndi KÍ at leggja trýst á. Einar tríggjar ferðir komu teir til baklinjuna í vinstru, og tað var um reppið, at teir skoraðu. Ove Nysted var akkurát ov stuttur at stúta, og Hallur Hansen vann tvídystin, tá Hjalgrím Elttør gjørdist hálvleysur og royndi at lyfta upp um málverjan.

Í yvirtíðini í 1. hálvleiki eydnaðist tað hjá KÍ at javna. Eftir uppspæl í vinstru stakk Hjalgrím Elttør bóltin tvørturum, og við handara stólpan var Harley Bertholdsen leysur.

Áðrenn brotssparkið og seinna GÍ málið sjey minuttir eftir steðgin, hevði KÍ ein gyltan møguleika. Eftir GÍ horna og skjótt KÍ uppspæl endaði bólturin hjá spælandi venjaranum, sum av brotssparksblettinum og í góðari støðu sendi í føvningin á GÍ málverjanum.

Annars vóru møguleikarnir fáir og smáir. Tá KÍ fram ímóti dystarenda flutti fólkið langt fram, hevði GÍ møguleikar fyri snarálopum. Í síðstu løtu endaði eitt sovorðið við, at Sámal Joensen varð spældur púra blankur mitt fyri, men skotið fór skeivu megin stólpan. Men tað løgdu gøtumenn vertin á, tí teir høvdu vunnið øll stigini.



*KÍ royndi at trýsta, men nærri enn næstan komuu teir ikki í seinna hálvleiki*

*Mynd: SjH*

**KÍ-GÍ 1-2 (1-1)**
0-1: Helgi L. Petersen 16
1-1: Harley Bertholdsen 45
1-2: Sámal Joensen (br.) 56

Dómari: Petur Hansen (LÍF)

KÍ: Meinhard Joensen – Símun Waag Høgnesen, Jan Andreasen, Niclas Niclassen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Tomislav Sivic, Allan Joensen, Fríðin Ziskason – Hjalgrím Elttør, Ove Nysted

GÍ: Hallur Hansen – Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Áslakur R. Petersen, Poul Henning Jacobsen, Sámal Joensen, Zdzislaw Janek, Helgi L. Petersen, Henning Jarnskor – Kaj Ennigarð

KÍ-TB 0-0:

# Málleyst í Klaksvík

**Klaksvíkingar vóru væl nøgdir við at fáa javnleik í fyrsta dystinum á árinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað regnaði illa í Klaksvík, tá hol skuldi setast á landskappingina í 2. deild leygardagin. Tvørámenn vóru komnir langa teinin til Klaksvíkar, og hóast teir stríddust væl í regninum, fingu teir bert eitt stig við sær.

Fortreytirnar hjá liðunum báðum vóru ymiskar undan dystinum. TB hevur verið við í bólkaspælinum í steypakappingini, og har hava teir fingið dystavenjing ímóti sterkum liðum. KÍ hevur hinvegin spælt tveir venjingardystir, so fyrireikingarnar hava ikki verið tað somu.

Tó kláraðu teir á heimaliðnum væl at fylgja við í dystinum, hóast tað í síðsta partinum av dystinum stóð á nakrar ferðir.

Í fyrra hálvleiki gekk javnt á. TB-verjan, har Magni Petersen stýrdi væl, hevði sum oftast taka á støðuni, og sama var skilið í hinum endanum, har Sámal Eyðfinn Poulsen var millum teir stinnastu.

## Lítið spæl

Á miðvøllinum var ofta talan um nærdystir og leysar bóltar, og bæði liðini høvdu ilt við at fáa veruligt samanspæl at ganga tvørturum og fram eftir vøllinum.

Í løtum vóru glottar, men umstøðurnar vóru ikki tær bestu at spæla undir. Tað regnaði alla tíðina, og vindurin gjørdi eisini stundum um seg.

Í seinna hálvleiki hevði TB munin, og einar tvær ferðir vóru teir nær við at fáa mál. Hetta var í seinasta partinum av dystinum, tá gestirnir royndu at fáa avgerandi málið.

Einu ferðina stútaði púra einsamallur TB’ari fram við KÍ-málinum úr stuttari frástøðu, og fleiri ferðir stóð nógv á í KÍ-brotsteiginum. Finn Baldvinsson bjargaði stutt fyri leiklok á strikuni, og tá dómarin bríkslaði dystin av, vóru tað ivaleyst klaksvíkingar, sum vóru betri nøgdir við úrslitið.

TB er millum sterkastu liðini í 2. deild, og tí má dysturin leygardagin metast at vera gott úrslit hjá KÍ, nú tá liðini hava havt so ymiskar fortreytir undan kappingini.